

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 11 - 2012

# Norski oljugrunnurin heimsins størsti

Norra hevur yvirhálað oljuríka emiratið Abu Dhabi og hava norðmenn nú heimsins størsta almenna íløgugrunn skrivar al-Arabiya. "Statens Pensionsfond - Udland", sum er veruliga heitið á norska oljugrunninum, gav eitt avkast uppá 4,7% í triðja ársfjórðingi. Tað merkir samtíðis, at móti endanum av oktober vóru 3782 milliardir krónur á kistubotninum í norska grunninum. Stóri arabiski íløgugrunnurin, sum norðmenn hava yvirhálað og sum verður umsitin av Abu Dhabi Investment Autority hevði um somu tíð eitt virði uppá einans 3654 milliardir. Teir 20 størstu almennu íløgugrunnarnir høvdu í juni eitt samlað virði uppá 10.920 milliardir krónur. Av teimum hevði ein triðingur heimstað í Miðeystri. Framleiðslan av olju og gassi á norska landgrunninum seinastu 40 árini hevur gjørt tað fyrr fátæka Noreg til eitt av heimsins ríkastu londum. Norra er í dag nummar sjey á listanum yvir oljuútflytandi lond og nr. 2, tá talan er um nátúrgass skrivar Ritzau/NTB.